


Kristian Zachariassen
Reiðskapserfrøðingur
Havstovan

# Hugskotið hjá blind

**Í 2001 gjørdi Líggjas Hansen í Sørvági fyrstu trolgrunnarnir, sum skuldu fara betur við umhvørvinum. Hugskotið var so áhugavert at tað kom við í eina stóra ES verkætlan, har endamálið er at gera trolreiðskap meira vinarligan móti umhvørvinum. Henda verkætlan er nú um at vera liðug og fyrstu úrslitini eru lovandi**



**Mynd 1**
*Líggjas Hansen*

Líggjas Hansen (1944 – 2004) var sjómaður stóran part av lívinum. Hann sigldi, sum maskinmaður við trolarum og arbeiddi í smiðju til sjúka gjørdi at hann misti sjónina. Hann gavst tó ikki at arbeiða, men fór at gera línubustir og aðra útgerð til útróðrarbátar.

Hugskotið við einum trolgrunni, sum skuldi fara betur við umhvørvinum hevði hann hugsað um í fleiri ár. Hann hevði ta hugsan, at trolreiðskapur næstan var tað einasta amboðið, har man ikki samstarvaði við náttúrukreftirnar. Eingin vildi farið við einari hjólbøru har hjólið var læst, plagdi hann at siga.

Ikki hevði hann hugsað, at 17 granskarar við sama skipi á sama túri skuldu kanna hansara hugskot.

## Hugskotið

Hugskotið hjá honum var onkusvegna at fáa sett hjól á ein trolgrunn. Hesi hjól skuldu rulla sama veg sum trolið fór. Trolgrunnurin er tann parturin av trolinum, sum kemur ímóti botninum. Vanligir trolgrunnar, sum brúktir verða ídag, eru samansettur av stórum gummiskivum, sum eru festar beinleiðis í trolið. Hetta ger at hesar gummiskivur ikki rulla, men verða drignar eftir botninum. Fyrimunurin við hesum grunnum er tó, at teir eru lættir at gera, og at fáir deilir eru, sum kunnu brotna.



**Mynd 2**
*Serliga hjólið á trolgrunninum*



**Mynd 3**
*Trolgrunnurin, sum royndur varð í ES verkætlanini. Hjólini rulla eftir botni, meðan pláturnar tetta ímillum hjólini, so at fiskur ikki sleppur út*